## Leygardagur 27. juli

**SVF**

16.00 Viftan
16.30 Kom og spæl
16.45 Oggy og kakkulakkarnir
16.55 Teldukæti
17.05 Oggy og kakkulakkarnir
17.15 Hitt kynið - am. ungdómsrøð
18.00 Kærleiki - donsk ungdómssending
18.30 Heidi og fjallaabbin 12:26
18.55 Neri, havsins genta 14:26
19.30 Hvat er boðið 5:5
20.00 Mánadagar undir Krákugjógv
20.45 Tann 6. sansurin
21.25 Inspector Morse: Hvør drap Harry Field?
23.10 Morð í Hvítu húsunum - amerikanskur spenningsfilmur - Óhóskandi fyri smábørn
00.50 Frekt og forboðið - amerikanskur ungdómsfilmur - Óhóskandi fyri smábørn
02.20 Liðugt

**EUROSPORT**

07:30 Swimming: European Championship Berlin Germany
08:30 Swimming Live: European Championship Berlin Germany
11:15 Tennis Live: Atp Tournament Kitzbühel Kitzbuhel Austria
12:45 Football: European Under-19 Championship Norway
13:45 Cycling Live: Tour De France
16:45 News: Eurosportnews Flash
17:00 Formula 3000: International Championship Hockenheim Germany
18:00 Football Live: Friendly Match
20:00 Swimming: European Championship Berlin Germany
21:00 Cycling: Tour De France +
21:30 Tennis Live: Wta Tournament Stanford United States
23:00 News: Eurosportnews Report
23:15 Tennis: Atp Tournament Los Angeles United States
00:45 News: Eurosportnews Report

**BBC PRIME**

0.00 Liquid News
0.30 TLZ: »War of the Century – Vengeance
1.30 TLZ: »Conspiracies – Disasters
2.00 TLZ: »Castles of Horror – Wheel of Fortune
2.30 TLZ: »Picturing the Genders
3.00 TLZ: »Poetry and Landscape
3.25 TLZ: »Mind Bites«
3.30 TLZ: »Modelling in the Long Term
3.55 TLZ: »Tales of the Expected - Riders
4.00 TLZ: »Asteroid Hunters
4.30 TLZ: »Gothic in India – Bombay Railway Station
5.20 TLZ: »Ever Wondered?«
5.30 TLZ: »The Programmers
6.00 Smarteenies
6.15 The Story Makers
6.30 Bodger and Badger: »Peace and Quiet
6.45 Playdays: »Whybird Stop«
7.05 Smarteenies
7.20 The Story Makers
7.35 Bodger and Badger: »The Et Toothbrush
7.50 Playdays: »Dot Stop«
8.10 Blue Peter Unleashed
8.35 Blue Peter Flies the World: »Canada
9.00 The Weakest Link
9.45 Battersea Dogs Home
10.15 Animal Hospital
10.45 Holiday Snaps: »Caribbean:Corfu: Norfolk
11.00 Garden Invaders: »Bolton
11.30 Going for a Song
12.00 Real Rooms: »Redditch Hospital
12.30 The Good Life: »A Tug of the Forelock
13.00 Doctors
13.30 Doctors
14.00 Doctors
14.30 Doctors
15.00 Dr. Who: »Ghost Light«
15.30 Dr. Who: »The Curse of Fenric«
16.00 Top of the Pops
16.30 Top of the Pops Prime
17.00 Liquid News
17.30 Ground Force: »Northampton
18.00 House Detectives Ellem Lodge: Scotland
18.30 Lost Gods of Easter Island
19.30 Jeremy Clarkson's Extreme Machines
20.00 Boston Law: »Child Abuse
20.30 Jailbirds: »Cutting Up
21.00 What the Victorians did for us: »Pleasure Seekers
21.30 Top of the Pops
22.00 Top of the Pops 2<
22.45 A Little Later: »Oasis
23.00 Liquid News
23.30 Parkinson: »Anne Robinson, Ewan Mcgregor,Nicole Kidman

**BBC WORLD**

0:00 BBC News
0:30 HARDtalk (r)
1:00 BBC News
1:30 Click Online (r)
2:00 BBC News
2:30 Correspondent (r)
3:00 BBC News
3:30 Asia Today (r)
3:45 World Business Report (r)
4:00 BBC News
4:30 Fast Track (r)
4:45 Holiday (r)
5:00 BBC News
5:30 Talking Movies (r)
6:00 BBC News
6:30 Simpson's World (r)
7:00 BBC News
7:30 Click Online (r)
8:00 BBC News
8:30 Correspondent (r)
9:00 BBC News
9:10 Curiouser And Curiouser: Lewis Carroll
10:00 BBC News
10:10 Great Railway Journeys: Return Ticket
11:00 BBC News
11:30 The Bike's The Star (r)
12:00 BBC News
12:30 This Week
13:00 BBC News
13:10 Curiouser And Curiouser: Lewis Carroll (r)
14:00 BBC News
14:30 Correspondent (r)
15:00 BBC News
15:10 Nobel Writers
16:00 BBC News
16:10 Great Railway Journeys: Return Ticket (r)
17:00 BBC News
17:30 Talking Movies (r)
18:00 BBC News
18:30 This Week (r)
19:00 BBC News
19:30 Earth Report (r)
20:00 BBC News
20:10 Curiouser And Curiouser: Lewis Carroll (r)
21:00 BBC News
21:30 Talking Movies (r)
22:00 BBC News
22:10 Nobel Writers (r)
23:00 BBC News
23:30 Simpson's World (r)

**TV3**

05:15 Garfield Og Venner
05:40 Garfield Og Venner
06:05 Børnehjørnet
09:10 Luftens Helte
10:05 Alt Under Kontrol
11:05 Kløcker Og Vingsøe Udfordrer Amerika
11:35 Rescue 77
12:30 Drømmeøen
13:30 Mig Og Bigfoot
15:15 Skat, Vi Har Skrumpet Os Selv
16:35 As If
17:05 Højdepunkter Fra Eco Challenge
19:00 Maxi-Strisser Og Mini-Strømer
20:45 Sex & The City
21:20 Sex & The City
21:50 Vejen Tilbage
23:45 Kodenavn Nikita
00:40 Kodenavn Nikita
01:35 Blind Faith
03:55 V.I.P.
04:50 Godnat

**ÚF**

07.00 Tíðindi
07.03 Morgunlestur - Petur Jacob Sigvardsen í Havn lesur
07.15 Morguntónleikur
07.30 Tíðindi
07.35 Morguntónleikur
08.00 Tíðindi
08.03 Leygarmorgun í studio 5 - Kim Hansen velur tónleikin
09.00 Tíðindi
09.03 Barnaútvarpið (e) - Jonna og Katrin stíla fyri
09.35 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e) - Petur Jacob Sigvardsen í Havn lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 2
10.10 Tit skriva, vit spæla
11.00 Rót og rútma - Petur Rouch velur country tónleik
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Vikan ið fer - Gunnar Skúvadal tekur saman um tíðindini í vikuni
14.00 Vikuskiftið (e) - Suni Merkistein stílar fyri
15.00 Menuettin - Jóannes S. Hansen skipar fyri.
16.00 Trý korter við Jakku Højgaard (e) - Jógvan Arge hittir Jakku Højgaard á Toftum. Fjórða og seinasta sending.
17.00 Suggan - Gissur Patursson velur løgini
18.30 Tíðindini
19.00 V4-dráttur
19.05 Hugnaligt leygarkvøld - Edward Nyholm Debes leggur til rættis.
20.00 Ólavsøkan byrjar - Elis Poulsen leggur til rættis
21.00 Harmonikutónar - Flóvin Jacobsen velur tónarnar
21.50 Hetta heilaga evangeliið skrivar - Jónsvein Bech, prestur, leggur til rættis
22.00 Tíðindi

**Rás**

09:45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
10:00 Tónleikur
13:00 Á Torginum (EvR) (e) - Endursending frá týsdegnum. Samrøða við Jógvan Purkhús (2.sending). Poul Johan Djurhuus leggur til rættis.
14:30 Tónleikur
17:00 Fólk á rásini (e) - Endursending frá 10. november 2001. Vagnur Michelsen prátar við Havgrím Gaasedal.
18:00 Tónleikur
21:15 Orðið (e) Endursending frá í morgun. Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
21:25 Tónleikur
23:00 Liðugt

**Lindin**

*(Eingin skrá komin)*

## Ólavsøkuaftan 28. juli

**SVF**

13.55 Ólavsøkan verður sett
14.35 Fílarnir í Burma — am. náttúrusending
15.30 Joe Cocker
16.00 Ein oyggj í Lapplandi — finsk sending
16.30 Mr. Bean
16.55 Aftur á Skattaoynna — bretskur ævintýrfilmur
18.25 Ólavsøkan verður sett e
19.00 Ólavsøkuaftan í Havn
20.30 Føroyar í dag — ein ferð aftur í 60'ini
21.05 Vit fara upp á gólv
21.30 Loynidómurin á Roan Inish
23.10 Formil 1 koyring í Týsklandi
01.10 Liðugt

**EUROSPORT**

07:30 Swimming: European Championship Berlin Germany
08:30 Swimming Live: European Championship Berlin Germany
10:30 Football: Friendly Match
12:00 Superbike Live: World Championship Europe Brands Hatch United Kingdom
13:00 Cycling Live: Tour De France
16:45 News: Eurosportnews Flash
17:00 Tennis: Atp Tournament Kitzbühel Austria
18:00 Nascar: Winston Cup Series New England United States
19:00 Football Live: European Under-19 Championship Norway
21:00 Superbike: World Championship Europe Brands Hatch United Kingdom
21:15 News: Eurosportnews Report
21:30 Tennis Live: Wta Tournament Stanford United States
23:00 Tennis: Atp Tournament Los Angeles United States
00:15 News: Eurosportnews Report

**BBC PRIME**

0.30 TLZ: »The Devil – An Unauthorised Biography – Is the Devil Dead?
1.20 The Empty Quarter
2.10 TLZ: »Tales of the Expected - Stackers
2.15 TLZ: »Mind Bites«
2.20 TLZ: »Ever Wondered?«
2.30 TLZ: »Mexico City - Whose City?
3.00 Ou D316 Virtual Democracy
3.25 TLZ: »Cyberart«
3.30 TLZ: »Rough Science
4.00 TLZ: »Talks – Background Brief: Therapy ON Trial
4.15 Ou Bites Science Bites
4.20 TLZ: »Hollywood Science - Speed
4.30 TLZ: »Lifelines
5.00 TLZ: »Wild Moves
5.30 Ou S365 Horses for COURSES: An Evolutionary Radiation
5.55 TLZ: »Maps – Under the Lens - Cow«
6.00 Smarteenies
6.15 The Story Makers
6.30 Yoho Ahoy: »Flotsam
6.35 Toucan Tecs: »Soccer IT to Them
6.45 Playdays: »Playground Stop«
7.05 Smarteenies
7.20 The Story Makers: »Carnival
7.35 Yoho Ahoy: »Pop
7.40 Playdays: »Patch Stop«
8.00 Blue Peter
8.25 Blue Peter
8.45 Top of the Pops Prime
9.15 Totp Eurochart
9.45 Battersea Dogs Home
10.15 Wildlife: »Reef Encounter
10.45 Holiday Snaps: »Worcestershire/France/Leeds«
11.00 Garden Invaders: »Whalley Range
11.30 The Antiques Inspectors Ironbridge
12.00 Real Rooms: »Walshall Girls Bedroom
12.30 Open All Hours
13.10 Eastenders Omnibus
13.35 Eastenders Omnibus
14.05 Eastenders Omnibus
14.35 Eastenders Omnibus
15.00 S Club 7 in Miami: »The Blue Chevy
15.25 S Club 7 in Miami: »Wind Resistance
16.00 Top of the Pops 2<
16.45 The Weakest Link
17.30 Gardeners' World
18.00 Bargain Hunt: »Shepton Mallet
18.30 Keeping Up Appearances
19.30 Yes Minister: »Jobs For the Boys
20.00 2 Point 4 Children: »Mayday
20.30 A Small Summer Party
21.30 Ruby's American Pie
22.00 Bottom: »S Out
22.30 The Cops
23.30 Dr. Who: »The Curse of Fenric«

**BBC WORLD**

0:00 BBC News
0:30 This Week (r)
1:00 BBC News
1:30 Fast Track (r)
1:45 Holiday (r)
2:00 BBC News
2:30 Simpson's World (r)
3:00 BBC News
3:30 Correspondent (r)
4:00 BBC News
4:30 This Week (r)
5:00 BBC News
5:30 The Bike's The Star (r)
6:00 BBC News
6:30 Reporters
7:00 BBC News
7:30 21st Century English (r)
8:00 BBC News
8:30 Earth Report (r)
9:00 BBC News
9:30 This Week (r)
10:00 BBC News
10:10 Nobel Writers (r)
11:00 BBC News
11:30 Click Online (r)
12:00 BBC News
12:30 Simpson's World (r)
13:00 BBC News
13:10 Great Railway Journeys: Return Ticket (r)
14:00 BBC News
14:30 Reporters (r)
15:00 BBC News
15:05 Dateline London
16:00 BBC News
16:10 Curiouser And Curiouser: Lewis Carroll (r)
17:00 BBC News
17:30 Fast Track (r)
17:45 Holiday (r)
18:00 BBC News
18:10 Nobel Writers (r)
19:00 BBC News
19:30 Simpson's World (r)
20:00 BBC News
20:10 Great Railway Journeys: Return Ticket (r)
21:00 BBC News
21:30 The Bike's The Star (r)
22:00 BBC News
22:30 Dateline London (r)
23:00 BBC News
23:30 Reporters
23:45 Asia Today

**TV3**

05:10 Garfield Og Venner
05:35 Garfield Og Venner
06:00 Børnehjørnet
09:05 Luftens Helte
10:00 Alt Under Kontrol
11:00 Hercules Den Uovervindelige
11:55 Drømmeøen
12:55 Medlem Af Familien
14:50 Er Du Computermand?
16:30 Any Day Now
17:30 Interne Affærer
18:30 Onside
20:00 Con Air
22:10 Airport 77
00:20 Kodenavn Nikita
01:15 Kodenavn Nikita
02:10 Harvey
04:10 Godnat

**ÚF**

10.00 Tíðindi
10.05 Barnaútvarpið - Jonna og Katrin leggja til rættis
10.30 Sálmar og sangir (e) - Hanus A. Samuelsen leggur til rættis.
11.00 Útvarpsguðstænasta - Thorben Johannesen, prestur, prædikar
11.50 Løgtingið 150 ár - Helgi Jacobsen leggur til rættis
12.20 Tíðindini
12.45 Føroyskur tónleikur
13.00 At vera skúlanæmingur í Havn í 20. øld - Frásøgumynd. Brot úr "Tórshavnar Skúlasøgu" eftir Jens Marius Hentze. Bjørgfinnur Nielsen leggur til rættis
13.30 Tað bágar ei, tað stendur til bót - Sending við føroyskum sangum. Janus Mohr leggur til rættis
14.00 Ólavsøkan verður sett
14.30 Síðsti FM-róðurin í ár
15.00 Kappróður á ólavsøku - Jógvan Arge og Suni Merkistein siga frá
17.00 Steypini verða handað
17.55 Á ólavsøku - burturi og heima - Tilfarið er úr sendingum, sum Danmark Radio hevur gjørt frá 1946 til 1954. Hans Egholm leggur til rættis.
18.30 Tíðindi
18.50 Ólavsøka á Parnassinum - Sending við samrøðum, frásagnum og tónleiki. Sent verður úr ólavsøkustudionum á Parnassinum. Bjørt Samuelsen, Bjarni Mohr, Elis Poulsen og Jens Tummas Næss leggja til rættis

**Rás**

09:45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
10:00 Tónleikur
13:00 Kelduvaðið (EvR) - Páll, Brynleif og Maria Poulsen siga frá um kristiboðan. Høgni Johannesen, trúboðari, talar yvir meginlærur Bíbliunnar.
14:00 Tónleikur
16:00 Barnarásin (EvR)
16:30 Tónleikur
20:00 Kelduvaðið (EvR) (e) - Endursending frá kl. 13.00 í dag.
21:00 Tónleikur
21:15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun. Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
21:25 Tónleikur
23:00 Liðugt

**Lindin**

*(Eingin skrá komin)*



Bill Justinussen, landsstýrismaður í Heilsumálum:

# – Eg eri ikki fundamentalistur

**Nýggi landsstýrismaðurin í Heilsumálum hevur fingið nógva umtalu, síðan hann tók við nýggja sessinum. Hann hevur skapt øsing við evnum sum rúsdrekka og fosturtøku, og onkur hevur eisini nevnt nýggja mannin fyri ein fundamentalist. Hesum er Bill tó ikki samdur í**



*– Endamálið er jú, at øll í Føroyum hava eins treytir og eins umstøður at liva undir. Tað er uttan iva eitt av teim størstu málunum, ið eg sum landsstýrismaður seti mær sjálvum, sigur Bill Justinussen, landsstýrismaður í Heilsumálum*

HEILSUMÁL
*Ragnhild Ellingsgaard*

– Í dag er ein fundamentalistur sum oftast ein, ið spreingir seg sjálvan í luftina. Tað hevði eg ongantíð kunna gjørt, sigur Bill.

Hann sigur víðari, at kristna læran byggir á, at Jesus jú lat sítt egna lív.

– Hann drap ikki onnur, men offraði seg sjálvan. Harumframt lærir hann okkum at hjálpa øðrum við at leggja okkara egna lív niður. Hetta samsvarar jú als ikki við nakra fundamentalismu, heldur Bill Justinussen.

Sum teim flestu kunnugt, so hevur nýggi landsstýrismaðurin í Familju- og Heilsumálum eina greiða lívsáskoðan, sum byggir á tey kristnu virðini.

Til tíðir hevur hetta havt hug til at ljóða harðari enn málini, hann hevur arbeitt við. Hóast Bill Justinussen er eitt nýtt blað innan landsstýrismál, so hevur hann longu fingið nógva umtalu. Bæði í fjølmiðlunum, og eisini manna millum.

Hansara greiðu meiningar um fosturtøku og rúsdrekkamál gjørdust kjakevni, og seinast hoyrdu vit um journalar hjá sjúklingum, sum skuldu gjøgnumlesast.

– Fólk fingu møguliga varhuga av, at eg ætlaði mær at lesa journalin hjá øllum, sum av eini ella aðrari orsøk hava framt fosturtøku. Men hetta er als ikki mín ætlan. Endamálið var bara at fáa nakrar heildarupplýsingar gjøgnum journalirnar. Ikki at granska persónlig viðurskifti, greiðir Bill frá.

Í dag hevur einans læknin og sjúklingurin sjálvur atgongd til hvønn einstakan journal, og soleiðis heldur Bill eisini, at tað eigur at vera.

– Trupulleikin er bara, at tað finnast nærum eingi hagtøl innan heilsuverkið, og tí fært tú heldur ikki farið undir nærri kanningar av nøkrum. Orsøkin er sjálvandi, at KT-útbúnaðurin á økinum er alt ov lítil, og tí fer øll mannagongd fram manuelt. Hetta er avgjørt eitt av evnunum, ið eg vil virka fyri at broyta, sigur Bill.

### Vitjar stovnar um landið

Í seinstu vikuni setti Bill skjøtul á eina ferð, sum umfatar vitjanir av øllum teim stovnunum, ið hann sum landsstýrismaður í Familju- og Heilsumálum hevur um hendi. Byrjað var á Landssjúkrahúsinum í Tórshavn, og fyri framman standa millum annað vitjanir av sjúkrahúsunum í Klaksvík og á Tvøroyri.

Endamálið er at fáa eitt innlit í, hvussu allir hesir ymsu stovnar í veruleikanum eru settir saman.

– Eg havi ein stóran áhuga í at hitta starvsfólkini á stovnunum, og á tann hátt fáa tey at greiða frá teirra sjónarmiðum um arbeiðsplássið. Eg vil fegin hoyra, hvørjar broytingar tey ynskja á teirra økjum, umframt at eg eisini vil geva pláss fyri teim tonkum, sum tey dagliga ganga við, sigur Bill.

Onkur annar vildi møguliga nýtt telefonina til hetta, heldur enn farið runt alt landið at ferðast. Men ikki Bill.

– Tú fært ikki eitt veruligt samskifti í lag gjøgnum telefonina. Eg vil fáa eitt innlit í øllum funktiónunum, sum eru á einum stovni. Sum ein vanligur brúkari hevur tú onga heildaruppliving av t. d. heilsuverkinum, men kennir bara eina funktión. Tá er ikki lætt at skula verða viðvirkandi til at fremja nakrar broytingar innan alt verkið sum eina heild, heldur Bill.

### Lívsdygdin styrkjast

Sum landsstýrismaður í Familjumálum er Bill Justinussen komin inn á eitt økið, sum hann sjálvur metir hevur havt ov lítlan týdning seinastu árini. Á politiska vígvøllinum hava menn heldur tosa um vinnupolitikk og annað, ið skal fáa pengarnar á rull í okkara lítla landið. Ein ítøkiligur familjupolitikkur hevur ikki havt nakað fast sætið, og hetta hevur eisini havt sína ávirkan á tey mál, sum hava verið umrødd.

– Men í veruleikanum er famliljan kjarnin í samfelagnum, sigur Bill og vísir á yvirlýsingina hjá EF, sum eisini vísir á familjuna sum ein kjarna.

– Seinastu tíðina hava vit bara lagt til merkis, at hetta samsvarar ikki júst við samfelagið, sum vit liva undir í dag. Denturin verður heldur lagdur á arbeiðslívi og umstøðurnar rundan um arbeiði. Familjan kemur í aðru røð, og noyðist hon at laga seg til arbeiðsumstøðurnar, heldur Bill.

Hann greiðir víðari frá, at hetta eisini setur alsamt størri krøv til barnaansingar-møguleikar, eldraíbúðir, frítíðarskúlar og so víðari. Familjan hevur stutt sagt ikki nóg mikið av tíð til hvønn annan, og tí mugu aðrir møguleikar finnast ístaðin.

– Heimið er meir ella minni vorðið eitt sovistað, sigur Bill.

Hetta er eisini eitt av teim málunum, sum Bill væntandi kemur at nýta nógva tíð saman við. Longu nú hevur hann greiðar ætlanir fyri, hvussu farið skal verða í gongd. Ein av ætlanunum umfatar eina kanning, sum skal lýsa støðuna hjá føroysku familjunum í dag.

– Her hugsi eg um eina kanning, har vit seta bæði foreldrum og børnum nakrar spurningar fyri at finna útav, hvat tey í veruleikanum ynskja av samfelagnum og hvør øðrum. Er teirra støða í dag optimal, ella kunnu broytingar gerast fyri at fáa hana optimala? Svarini frá hesi kanning skuldi givið okkum eitt gott grundarlag, sum vit síðani kundu arbeitt víðari uppá, greiðir landsstýrismaðurin frá.

### Øll skulu javnsetast

Bústaðarpolitikkurin í Føroyum vigar eisini nógv í framtíðarætlanunum hjá landsstýrismanninum. Tað er eingin loyna, at útlitini fyri at seta búgv í Føroyum ikki eru av tí bestu. Serliga meginøkið er hart rakt av hesum trupulleika, og harumframt er torført hjá ungum fólki at finna nakra íbúð at búgva í. Samstundis hækkar príslegan fyri leigu eisini, og hetta ger alt bara enn meira torført.

– Longu nú er ein skjóttarbeiðandi arbeiðsbólkur settur fyri at kanna hetta málið nærri. Hugskotið er fyrst og fremst at javnstilla øll fólk, hvat antin tey búgva til leigu onkrastaðni, ella tey eru farin undir at byggja sítt egna, greiðir Bill frá.

Í løtuni fær ein sjálvsognarstovnur ongan mvglætta og heldur ongan rentustuðul, og hetta viðførir samstundis ein stóran mun millum tey, sum leiga og tey, sum byggja sjálvi.

– Hesin munur skal burturbeinast, og harumframt er Vinnumálastýrið eisini farið í holt við at seta eina leigulóg, sum skal betra um umstøðurnar hjá teim leigandi, greiðir Bill frá.

Hóast hetta ikki hoyrir undir júst hansara málsøkið, so fegnast Bill um lógina, sum væntandi kemur ein av fyrstu døgunum.

– Endamálið er jú, at øll í Føroyum hava eins treytir og eins umstøður at liva undir. Tað er uttan iva eitt av teim størstu málunum, ið eg sum landsstýrismaður seti mær sjálvum, sigur Bill at enda í samrøðu við Sosialin.